KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 29.09.2016 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Eyðstein Ó. Poulsen, Erling Petersen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 65/16 | 16/00952-3 | Integratiónsnevndin eftirmetast |
| 66/16 | 16/01002-3 | Skattafrælsi - ABC Barnahjálp/Hilda Viderø |
| 67/16 | 16/00927-3 | Byggisamtyktarbroyting í samband við bygging av mentanarhúsi |
| 68/16 | 16/00981-1 | Regulering av økismarki móti sjónum |
| 69/16 | 16/01016-1 | Víðkan av økisparti B17 í samband við bygging hjá SEV |
| 70/16 | 15/00885-12 | Marknaumskipan og sundurbýti ísv. matrkulering til grundøkir |
| 71/16 | 16/00988-2 | Samanlegging av matr. nr. 29a og 44 í Ánunum |
| 72/16 | 16/00745-5 | Umstøður frammanfyri handilshølum á Stangarvegnum gerast tíðarhóskandi |
| 73/16 | 16/00942-5 | Ferðsla við Skúlatrøð ísb. bygging - *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 74/16 | 16/00993-1 | Øktur tørvur á barnaansingarplássum - *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 75/16 | 15/00580-9 | Klaksvík sum demensvinarligur býur; átøk í 2016 - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 76/16 | 14/00331-15 | Hitaskipanin á Læknamiðstøðini - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 77/16 | 16/00022-6 | Asfalteringin í 2016 - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 78/16 | 16/00047-1 | Fíggjarætlanin á Skúlatrøð 2016 - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 79/16 | 16/00567-3 | Mentanarøkið, 2016 - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 80/16 | 16/00640-1 | Strategi fyri framtíðar virksemið hjá NBH - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 81/16 | 15/00577-49 | Maritimur depil |
| 82/16 | 16/00998-3 | Fíggjarætlan 2017 (fíggjarkarmur), Klaksvíkar kommuna |

**65/16**
**16/00952 Integratiónsnevndin eftirmetast**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Integratiónsnevndin | 21.09.2016 | 5/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 70/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 65/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 21. sept. 2016, við uppleggi til eftirmeting av Integratiónsnevndini og mannagongdum/skipan kring nevndina. Integratiónsnevndin hevur havt fimm fundir í royndartíðarskeiðinum, tveir í 2015 og tríggir higartil í 2016.

Nakrir av spurningunum at umrøða og viðgera í eftirmetingini eru:
(a) Hvussu ofta og hvat klokkan skulu fundir verða framyvir í nevndini?
(b) Skipan av fundunum, herundir freistir fyri at senda út skrá og tilmælir til nevndarlimir?
(c) Skipan av funktiónini sum skrivari/málsviðgeri?
(d) Integratiónssamskiparin
(e) Hvønn leiklut skulu nevndarlimir hava?
(f) Annað?

**Lógargrundarlag:**
Enn er eingin ítøkiliga lóggáva, sum beinleiðis áleggur ella heimilar kommunum at arbeiða fyri integratión av tilflytarum í kommununi, men við støði í tí siðvenju, sum longu er upparbeidd í samstarvi millum land og kommunu, har Klaksvíkar kommuna hevur gingið á odda, er eingin ivi um, at hetta virksemi er at meta sum eitt neyðugt, almannagagnligt arbeiði, sum tískil er innan fyri karmarnar av kommunufulltrúini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kostnaðurin av Integratiónsnevndini er í høvuðsheitum avmarkaður til fundarsamsýniningar til limirnar. Aftur at hesum kemur samsýning til integratónssamskiparan, sum er umleið kr. 5.000,- um mánaðin. Aðrar umsitingarligar uppgávur verða røktar av býráðsumsitingini, og tá ið tað kemur til tiltøk, sum nevndin hevur sett í verk, verða hesi somuleiðis borin av játtanini til býráðsumsitingina.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður málið við hesum lagt fyri Integratiónsnevndina til umrøðu og viðgerð av víðari skipan av arbeiðnum hjá Integratiónsnevndini og hennara umsiting.

**InN 21-09-2016:**
(a) Hvussu ofta og hvat klokkan skulu fundir verða framyvir í nevndini?
Mælt verður til at halda fast við verandi fundarskipan.
(b) Skipan av fundunum, herundir freistir fyri at senda út skrá og tilmælir til nevndarlimir?
Mælt verður til, at arbeiðið verður skipað sum í staðbundnu nevndunum.
(c) Skipan av funktiónini sum skrivari/málsviðgeri?
Mælt verður til, at ein málsviðgeri í býráðsumsitingini verður knýttur at nevndini.
(d) Integratiónssamskiparin
Mælt verður til, at David Im heldur fram sum integratiónssamskipari.
(e) Hvønn leiklut skulu nevndarlimir hava?

Mælt verður til, at nevndarlimir halda fram við tí óformliga samskiftinum við tilflytarar í kommununi.

(f) Annað?

-

**FíN 27-09-2016**
Nevndin tekur undir við InN 21-09-2016.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 27-09-2016.

## 66/16
## 16/01002 Skattafrælsi – ABC Barnahjálp/Hilda Viderø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 68/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 66/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 19. sept. 2016, ið greiðir frá málinum.

**Lógargrundarlag:**
Víst verður til § 3, stk. 4 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 og kunngerð nr. 86. frá 19. oktober 1999 um skattafrælsi í sambandi við vælgerandi arbeiði.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Skattafría upphæddin kann í mesta lagi vera kr. 108.000 árliga og við skattaprosentinum upp á 20,75% merkir hetta, at persónsskattainntøkurnar hjá Klaksvíkar Kommunu lækka 16 tkr.

**Tilmæli:**
Umsitingin hevur einki at viðmerkja til Taks-ráðið í samband við teirra málsviðgerð av umsóknini hjá ABC Barnahjálp vegna Hildu Viderø um fáa skattafrælsi vegna arbeiði hennara innan felagsskapin Føroyska barnahjálpin.

**FíN 27-09-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 19-09-2016.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 27-09-2016.

## 67/16
## 16/00927 Byggisamtyktarbroyting í samband við bygging av mentanarhúsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2016 | 56/16 | |
| 2 Mentanarnevndin | 20.09.2016 | K-13/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 67/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv dagf. 22. aug. 2016 frá Grunninum Mentanarhúsið í Klaksvík. Ætlaða nýbyggingin rúmast ikki innanfyri verandi økismark. "Posthúsbygningurin" liggur í dag í økisparti A5 (blandað íbúðar- og vinnuøki). Við fyriliggjandi ætlan um um- og útbygging til mentanarhús er neyðugt at víðka økið nakað eystureftir – inn í verandi D10-øki (grønt øki), samstundis sum lagt verður upp til, at ásetingin verður broytt til E4 (mentanar- og almenn endamál).







**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 1. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Út frá fyriliggjandi vinnarauppskoti til mentanarhús mælir tekniska umsiting til at fara undir tilgongdina við broyting av byggisamtyktina samsvarandi viðhefta skjali I+II.

**UBN 19-09-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 05-09-16.

**MeN 20-09-2016:**
Málið verið til kunning.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 19-09-2016.

## 68/16
## 16/00981 Regulering av økismarki móti sjónum – víðka B1-økið á Borðoyarvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2016 | 59/16 | |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 20.09.2016 | 23/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 68/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Bakkafrost hevur søkt um byggiloyvi til goymsluhøll á økinum sunnanfyri bátahylin á Borðoyarvík. Fyri at kunna játta umsókta byggiloyvi verður neyðugt at flyta byggisamtyktar-økislinjuna, soleiðis at útfylta økið verður partur av B1-økispartinum.



**Lógargrundarlag:**
Lógtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Mælt verður til

- beinanvegin at fara undir tilgongdina við broyting av byggisamtyktini fyri økispart B1

Tá byggisamtyktarbroytingin er góðkend, at víðka leiguøkið hjá Bakkafrost svarandi til tað, sum nýbyggingin leggur upp til.

**UBN 19-09-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 12-09-2016.

**HaVN 20-09-2016:**
Nevndin tekur undir við UBN 19-09-2016.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 19-09-2016 og HaVN 20-09-2016.

## 69/16
## 16/01016 Broyting í byggisamtykt - víðkan av økisparti B17 í samband við bygging hjá SEV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2016 | 65/16 | |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 20.09.2016 | K-20/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 69/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til fráboðan frá SEV á fundi 16. sept. um ætlanir um at byggja koblingsstøð norðanfyri verandi el-verk á Strond. Ongar tekningar fyriliggja enn av ætlanini, men staðfestast kann, at neyðugt verður at víðka økispart B17 norðureftir.
Á myndini niðanfyri sæst nýggja økismarkið við reyðum, samstundis sum víst verður við gulum á eigaraviðurskiftini í aktuella økinum.




**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-
**Tilmæli:**
Mælt verður til beinanvegin at fara undir tilgongdina við broyting av byggisamtyktini fyri økispart B17 á Strond.

**UBN 19-09-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 16-09-2016.

**HaVN 20-09-2016:**
Málið verið til kunning.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 19-09-2016.

## 70/16
## 15/00885 Marknaumskipan og sundurbýti í samband við matrkulering til grundøkir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2016 | 57/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 70/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til tilmæli dagf. 27.10.2015 og UBN-nevndarsamtykt 2.11.2015 í hesum máli.

Umsøkjarin hevur nú boðað frá, at hann hevur møguleika at ogna sær niðara part av matr. nr. 797$^{a}$ afturat matr. nr. 751a, sum hann eigur frammanundan. Við hesum skapar hann møguleika fyri tveimum grundøkjum á jørð síni omanfyri Fossagøtu.
Ognin markar suðureftir móti matr. nr. 739e, sum er kommunal ogn, sum aftur markar móti kommunalum vegi.




**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Tekniska umsiting mælir til at viðmæla marknaumskipan og sundurbýti við grundøkjum fyri eyga og skjýtur upp, at vegatkoman í fyrstu atløgu verður loyst við tinglisnum ferðslurætti gjøgnum matr. nr. 739e og 751a. Upplýsast skal, at stykkini koma at gjalda íbindingargjald í samband við útskriving av byggiloyvi.

**UBN 19-09-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 12-09-2016.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 19-09-2016.

## 71/16
## 16/00988 Samanlegging av matr. nr. 29a og 44 í Ánunum til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 19.09.2016 | 60/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 71/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til samanlegging av matr. nr. 29a og 44 í Ánunum.
Talan er um grannaognir innanfyri sama økispart – A24 (Blandað íbúðar- og vinnuendamál).




**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti..

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Umsitingin hevur onki ímóti, at umsóknin verður játtað.

**UBN 19-09-2016**
Nevndin tekur undir við málinum.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 19-09-2016.

## 72/16
## 16/00745 Umstøður frammanfyri handilshølum á Stangarvegnum gerast tíðarhóskandi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 20.09.2016 | 12/16 | |
| 2 Tekniska Nevnd | 21.09.2016 | 26/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 61/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 72/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting, dagf. 17. aug., ið greiðir frá málinum.

**Tilmæli:**
Tekniska umsiting fer við hesum at mæla til, at projektið Stangavegurin verður dagført í ár við serligum atliti til ætlanina hjá handilsfyritøkuni, og at peningur verður settur av til Stangavegin í komandi ári/árum sambært omanfyri standandi.

**FeN 20-09-2016**
Nevndin tekur undir við tilmæli dagfest 17-08-2016.

**TN 21-09-2016:**
Nevndin tekur undir við FeN 20-09-2016.

**FíN 27-09-2016**
Nevndin tekur undir við FeN 20-09-2016 og TN 21-09-2016.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 27-09-2016

## 73/16
## 16/00942 Ferðsla við Skúlatrøð ísv. bygging - september 2016 – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 20.09.2016 | 13/16 | |
| 2 Tekniska Nevnd | 21.09.2016 | 27/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 59/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, fyrra viðgerð | 29.09.2016 | 73/16 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð, seinna viðgerð | 27.10.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 13. sept. 2016, ið lýsir málið viðv. ferðslutrupulleikum uttanfyri Norðoya Sparikassa og á Gerðagøtu í samband við skúlabyggingina. Tekniska umsiting hevur í hesum sambandi, saman við byggileiðaranum á skúlaverkætlanini og arkitekti frá Fuglark, verið á fundi við Norðoya Sparikassa. Sparikassin er jaligur fyri einari loysn til frama fyri ferðslutrygdina í samband við atkomuna til Skúlatrøð í byggitíðini.

Fyri at bøta um íkomnu støðuna viðvíkjandi parkering til starvsfólk á Skúlatrøð verður mælt til at grava út og planera matr. nr. 1444 (omanfyri kirkjugarðin á Ziskatrøð), ið er ogn hjá Klaksvíkar kommunu.

Í sambandi við ferðsluna eftir Gerðagøtu til og frá skúlanum verður mælt til, at endaliga loysnin, sum víst í skúlaprojektinum (tekning 2 frá Fuglark, dagfest 14-09-2016), verður framd sum skjótast.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| | |
|---|---|
| Fremjan av øki kring Sparikassan (víst í tekning frá FA dagfest 13-09-2016) | kr. 300.000 |
| Útgrava og planera matr. nr. 1444 til parkeringspláss | kr. 200.000 |
| Samlað eykajáttan til átrokandi ferðsluregulering: | kr. 500.000 |

At skipa Gerðagøtu, so hendan verður í tráð við verkætlanina, er leysliga kostnaðarmet til kr. 2.000.000,-, og eigur hetta at takast upp í samband við skúlaprojektið. Víst verður til viðheftu tekning 2 frá Fuglark dagfest 14-09-2016.

**Tilmæli:**
Tekniska umsiting mælir til, at uppskot frá Fuglark, dagfest 13-09-2016, verður framt og galdandi fram til skúlaverkætlanin væntandi er liðug í 2018, har Klaksvíkar kommuna ber kostnaðin av etablering, rakstri og viðlíkahaldi, umframt at útgrava og planera matr. nr. 1444 til parkeringspláss (víst verður til mynd 1).

Í sambandi við ferðsluna til og frá skúlanum í Gerðagøtu mælir tekniska umsiting til, at endalig loysn, sum víst í skúlaprojektinum (tekning 2 frá 14-09-2016), verður framd sum skjótast.

**FeN 20-09-2016**
FeN 20-09-2016

- Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 13-09-2016
- Nevndin leggur upp til at fremja gonguteig um Gerðagøtu, yvir av gongugøtuni, eftir sama leisti sum gonguteigurin við Føroya Tele.

**TN 21-09-2016:**
Nevndin tekur undir við FeN 20-09-2016. Ein minniluti: Jóhann Lützen og Kristian Eli Zachariasen, mælir til eina eykajáttan uppa kr. 500.000,-. Ein meiriluti: Steinbjørn O. Jacobsen, Erling Petersen og Gunvá við Keldu mælir til at peningurin, kr. 500.000,-, verður tikin av íløgujáttanini til skúlan í 2016.

**FíN 27-09-2016**
Nevndin tekur undir við málinum og mælir til at fíggja við eykajáttan.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Tilmælið frá FíN 27-09-2016 samtykt við 9 atkv. fyri – JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP, ASJ og HJS – og 2 atkv. ímóti – GvK og EP.

## 74/16
## 16/00993 Øktur tørvur á barnaansingarplássum – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 20.09.2016 | 29/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 56/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, fyrra viðgerð | 29.09.2016 | 74/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, seinna viðgerð | 27.10.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 13. sept. 2016, um bráðfeingis loysn á barnaansingarøkinum. Barnatalið í kommununi økist støðugt. Tá stóra upptøkan var í summar, fóru 15 av plássunum til børn, sum eru flutt til kommununa. Fyri at kommunan kann veita ansingartrygd, er neyðugt at stovnseta fleiri nýggj pláss og allarhelst innan stutta tíð, tí talan í nøkrum førum er um bráðfeingis tørv.

Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur, sum er biðin at koma við einum tilmæli um, hvussu dagstovnaøkið í Klaksvík skal skipast framyvir. Bólkurin hevur eisini umrøtt spurningin viðvíkjandi manglandi plássum og mælir staðiliga frá at brúka sethús til hetta endamál, tí royndir vísa, at tey ikki eru væl egnað til hetta endamál. Tíðin er komin til at byggja nýggjar dagstovnar, sum eru gjørdir til endamálið.

**Lógargrundarlag:**
*Dagstovnalógin
*Vegleiðing frá Landslæknanum um loyvt barnatal pr. fermetur

**Fíggjarligar avleiðingar:**
**Til rakstur pr. ár:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12 vøggustovupláss | 1.033.188,- kr | | |
| 18 barnagarðspláss | 937.548,- kr | | |
| Rakstur tilsamans pr. ár | 1.970.736,- kr | um mánaðin | 164.228,- kr |

**Íløga:**

| | |
|---|---|
| Kostnaður pavillon | 1.700.000,- |
| Flutningur (meting) | 250.000,- |
| Fundament við íbinding til hita og vatn: | 500.000,- |
| Parkeringsviðurskiftir | 500.000,- |
| Innbúgv og útgerð | 150.000,- |
| Mett íløga | 3.100.000,- |

**Tilmæli:**
Grundað á stóran eftirspurning eftir ansingarplássum, mælir umsitingin til, at TrN B&U gevur umsitingini heimild at arbeiða víðari við og at seta í verk ætlanina at stovnseta fleiri barnaansingarpláss í kommununi.

**TrN B&U 20-09-2016**
Ein meiriluti, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen og Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við tilmælinum um bráðfeingis loysn á barnaansingarøkinum frá umsitingini dagfest 13.09.16. Meirilutin bíðar eftir tilmælinum frá serfrøðingabólkinum, ið er settur at koma við tilmæli til TrN B&U um skipan av dagstovnaøkinum.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen og Herfrí Sørensen, mælir til at finna eina varandi loysn á vantandi barnaansing og mælir til, at Klaksvíkar kommuna fer at byggja ein nýggjan dagstovn við útibarnagarði til umleið 100 børn, og at kommunan setur neyðuga peningin av í 2017 og 2018.

**FíN 27-09-2016**
Ein meiriluti, JS, ÓK, SVJ og EÓP, tekur undir við meirilutanum í TrN B&U 20-09-2016 og mælir til, at tekniska umsiting ger eina góðskumeting av bygninginum, so hann kann nýtast til føroysk viðurskiftir.
Ein minniluti, ASJ, tekur undir við minnilutanum í TrN B&U 20-09-2016.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Tilmælið frá meirilutanum í FíN 27-09-2016 samtykt við 8 atkv. fyri – JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP og EP – og ongari atkv. ímóti. 3 atkvøddu blankt - GvK, ASJ og HJS.

## 75/16
## 15/00580 Klaksvík sum demensvinarligur býur – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir" | 14.06.2016 | 5/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 47/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, fyrra viðgerð | 23.06.2016 | 53/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, seinna viðgerð | 29.09.2016 | 75/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. juni 2016.

**TrN E&B 13-06-2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, men við tí broyting at upphæddin verður hækkað til kr. 100.000,-

**FíN 21-06-2016:**
Nevndin tekur undir við TrN E&B 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Málið einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 76/16
## 14/00331 Hitaskipanin á Læknamiðstøðini – *eyakjáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir" | 14.06.2016 | 4/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 48/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, fyrra viðgerð | 23.06.2016 | 54/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, seinna viðgerð | 29.09.2016 | 76/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. juni 2016.

**TrN E&B 13-06-2016**
Nevndin tekur undir við at játta peningin, so arbeiðast kann víðari við at loysa klimatrupulleikan á Læknamiðstøðini.

**FíN 21-06-2016:**
Nevndin tekur undir við TrN E&B 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Málið einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 77/16
## 16/00022 Asfalteringin í 2016 – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 16.06.2016 | 20/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 49/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, fyrra viðgerð | 23.06.2016 | 55/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, seinna viðgerð | 29.09.2016 | 77/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. juni 2016.

**TN 16-06-2016:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 03-06-2016, og mælir til at hesir vegir verða tiknir við: Hamarsniðið, Víkavegurin og Bumshamarsvegur.

**FíN 21-06-2016:**
Nevndin tekur undir við TN 16-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Málið einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 78/16
## 16/00047 Fíggjarætlanin á Skúlatrøð 2016 – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.06.2016 | 1/16 | |
| 2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.06.2016 | 24/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 50/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, fyrra viðgerð | 23.06.2016 | 56/16 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð, seinna viðgerð | 29.09.2016 | 78/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. juni 2016.

**TrN B&U 19-01-2016**
Nevndin samtykti at útseta málið til komandi nevndarumfar.

**TrN B&U 14-6-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 13-01-2016.

**FíN 21-06-2016:**
Nevndin tekur undir við TrN B&U 14-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Málið einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 79/16
## 16/00567 Mentanarøkið, 2016 – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2016 | 31/16 | |
| 2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.06.2016 | 23/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 51/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 57/16 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 79/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. juni 2016.

**MeN: 13. juni 2016**
Nevndin tekur undir við tilmælinum – og at ferð verður sett á ognan av lendi í Ánunum, og at staðsetingin av økinum í Ánunum verður nr trý í røðini.

**TrN B&U 14-06-2016:**
Nevndin tekur undir við MeN 13-06-2016.

**FíN 21-06-2016:**
Nevndin tekur undir við TrN 14-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Málið einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 80/16
## 16/00640 Strategi fyri framtíðar virksemið hjá NBH – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir" | 14.06.2016 | 6/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 52/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 58/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 80/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt í býráðnum 23. juni 2016.

**TrN E&B 13-06-2016**
Nevndin tekur undir við Stýrinum fyri NBH um at hækka raksturin, samsvarandi tilmælinum.

**FíN 21-06-2016:**
Nevndin tekur undir við TrN E&B 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Málið einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 81/16
## 15/00577 Maritimur depil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 20.09.2016 | 17/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 81/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 12. sept. 2016, har m.a. verður greitt kanningarúrslitum frá aldukanning gjørdari fyri Klaksvík. Nevnast skal, at tær útbyggingar o.a., sum eru farnar fram runt vágna, ikki hava gjørt viðurskiftini nakað serligt verri.
Arbeitt verður víðari við málinum, og væntandi kann projekteringarbeiðið byrja innan 1. okt. Nú liðið er so langt út á árið, er ivasamt, hvussu nógv av verkætlanini kann náast í ár, men møguleikin fyri at ordra nýggjar brúgvar eigur at kannast. Væntast kann, at leveringstíð er uppá hetta, og mett verður, at hetta kostar uml. kr. 5 mill.

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avsett er kr 6 mill. til verkætlanina á fíggjarætalini 2016, íløgur.

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri nevndina til umrøðu og støðutakan, hvussu víðari verður farið fram.

**HaVN 20-09-2016**
Nevndin tekur undir við at fara víðari við málinum og mælir til at heinta tilboð inn og um møguligt keypa brúgvar innan fyri fíggjarkarmin.

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við HaVN 20-09-2016.

## 82/16
## 16/00998 Fíggjarætlan 2017 (fíggjarkarmur), Klaksvíkar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 69/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2016 | 82/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 22. sept. 2016, viðv. fíggjarkarminum fyri 2017.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevd og býráð samtykkja framskrivaða fíggjarkarmin, ið verður grundarlag fyri viðgerðini á temadøgunum 4. okt. og 17. nov. á felagsnevndarfundunum.

**FíN 27-09-2016**
Nevndin mælir til niðanfyristandandi útgangsstøði fyri fíggjarkarmin fyri fíggjarárið 2017 og beinir málið í býráðið til víðari viðgerð.

| | Æ2017 (mió. kr.) |
|---|---|
| Inntøkur | 236.161 |
| Rakstur | 171.016 |
| | 65.145 |
| Rentustuðul | 4.500 |
| | 60.645 |
| Rentur | 6.100 |
| Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir | 54.545 |
| Íløgur | |
| | 54.545 |

**Býráðsins samtykt 29-09-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við tí av FíN 27-09-2016 samtykta fíggjarkarminum fyri 2017 og at beina málið til víðari viðgerð á temafundum í oktober og november.